umhvørvisstovan

SØRVÁGS KOMMUNA
VARÐAGØTA 8
380 SØRVÁGUR
FØROYAR

Argir hin 28. januar 2020
Málsnr.: 19/01130
Tykkara málsnr.:
Málsviðgeri: Sjúrður J. Ferjá

# Loyvi til aftursøkking

## 1 Loyvi og heimild

Sambært §2 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001 um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum við seinni broytingum, veitir Umhvørvisstovan við hesum Sørvágs kommunu loyvi til at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp úr í sambandi við reinsan við bátahylin í Sørvági.

## 2 Umsóknin

Hin 18. desember 2019 fekk Umhvørvisstovan umsókn frá Sørvágs kommunu, um loyvi at aftursøkkja tilfar, sum ætlanin er at taka upp í sambandi við røkt av bátahylinum.

Ætlanin er at dýpa eitt øki á 1000 $m^2$ tveir metrar. Roknað verður við, at samlaða nøgdin, sum verður tikin upp er uml. 2.000 $m^3$. Søkt verður um loyvi at søkkja tilfarið eystan fyri bátahylin, sí hjálagt kort. Tilfari er eyrur, sandur og móra. Ætlanin er at endurnýta partar av eyrinum á landi. Restin skal aftursøkkjast á nevnda staði.

## 3 Ummæli

Sambært §5 í áðurnevndu kunngerð um aftursøkking, skulu umsóknir um loyvi til aftursøkking sendast til Fiskimálaráðið, Landsverk og avvarðandi kommunu til ummælis.

Hin 19. desember 2019 varð umsóknin send Fiskimálaráðnum, Landsverki og Sørvágs kommunur til ummælis.

Sørvágs kommuna og Landsverk høvdu onga viðmerking.

Fiskimálaráðið bað Vørn og Havstovuna um at gera viðmerkingar til ætlanina hjá Sørvágs kommunu. Vørn hevur ikki viðmerkingar til ætlanina. Havstovan mælir til, at umsóknin verður gingin á møti.

## 4 Kanningar av botntilfarinum

Umhvørvisstovan hevur ikki orsøk til at halda, at tilfari inniheldur dálkandi evnir, og tí verður ikki sett krav um at gera kanningar av tí.

## 5 Avgerð

Umhvørvisstovan metir, at tilfari, sum er savnaður í bátahylinum hevði verið aðrastaðni á økinum nærhendis, um eingin bátahylur var á staðnum, og at tilfari tí neyvan fer at verða til stórvegis ampar. Tí hevur Umhvørvisstovan tikið avgerð um, at loyva at søkkja tilfari eystan fyri bátahylin.

Avgerðin er grundað á tilmælini í málinum og egnar metingar.

## 6 Treytir

Loyvið til aftursøkking er treytað av hesum ásetingum:

6.1 Aftursøkkingin kann ikki fara fram, fyrr enn kærufreistin upp á 4 vikur sambært parti 9 um kæruvegleiðing, er úti.

6.2 Um møguligt skal tilfarið fáast til nyttu, t.d. til uppfylling ella annað, so at minst møguligt verður aftursøkt.

6.3 Loyvið umfatar bara tilfar, sum er tikið upp av botni á økinum, sum er tilskilað í umsóknini.

6.4 Umhvørvisstovan skal hava fráboðan um nær arbeiðið byrjar og tá arbeiðið er liðugt.

6.5 Nøgdin, sum verður aftursøkt skal skrásetast. Tá arbeiðið er liðugt, skal frágreiðing sendast Umhvørvisstovuni um, hvussu nógv er aftursøkt, nær arbeiðið varð gjørt o.s.fr.

## 7 Eftirlit

Umhvørvisstovan hevur eftirlit við, at treytirnar í hesum loyvi verða hildnar. Sørvágs kommuna skal lata allar upplýsingar, sum eru neyðugar, og skapa umstøður fyri, at Umhvørvisstovan kann útinna eftirlitið.

## 8 Gjald

Sørvágs kommuna skal, sambært kunngerð nr. 102 frá 22. oktober 2012 um gjøld hjá Umhvørvisstovuni fyri umsiting og eftirlit sambært lóggávuni á umhvørvisøkinum, rinda fyri ta viðgerð, Umhvørvisstovan hevur havt í sambandi við hetta loyvi. Somuleiðis skal gjaldast fyri møguligt eftirlit.

Gjaldið verður roknað við grundarlagi í tíðarnýtsluni og øðrum kostnaði í sambandi við viðgerðina.

## 9 Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært §10 í kunngerð nr. 38 frá 8. mars 2001, um aftursøkking av tilfari, sum er tikið upp av havbotninum við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum sendir hana til landsstýrismannin saman við neyðugum skjølum.

Kærufreistin er fýra vikur frá tí degi, loyvið er almannakunngjørt. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Loyvið fær ikki gildi fyrr enn kærufreistin er úti.

Suni Petersen, Deildarleiðari

/

Sjúrður J. Ferjá, umhvørvisviðgeri

Mynd av bátahylinum í Sørvági. Markeraða øki er har tilfari verður tikið.



Myndin niðanfyri vísur staðið, har tilfari verður aftursøkt.

